

*Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóri, heldur fyrilestur í Nóatúni í annaðkvøld*

# Riggaði amboðskassin hjá Høgna?

*Í annaðkvøld heldur Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóri, fyrilestur í røðini við evnum úr Hvítubók. Evnið hesaferð er: Fjølmiðlarnir og størri kollektivar avgerðir, við atliti at sjálvstýrismálinum*

Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipa fyri almennum fyrilestri mikukvøldið 16. februar 2000 kl. 20.00 í Nóatúni 1.

Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóri, heldur fyrilestur, ið hann kallar: *Fjølmiðlamir og størri kollektivar avgerðir, við atliti at sjálvstýrismálinum.*

Hetta er sætti fyrilestur í røðini við evnum m.a. úr Hvítubók.

Tróndur Djurhuus hevur útbúgving frá Danmarks Journalisthøjskole eftir eina støðis-útbúgving í Samfelagsvísindi við Roskilde Universitetscenter. Tróndur starvaðist sum journalistur á bløðum, í Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya, áðrenn hann fyri stívliga fimm árum síðan tók við starvi sum stjóri í Sjónvarpinum. Hann er føroyskt umboð í Nordvisiónini og umboðsráðslimur í Circom Regional, sum er heimsins størsti felagsskapur av sjónvarps-rásum.

Riggaði amboðskassin hjá Høgna? Í fyrilestrinum fer Tróndur Djurhuus m. a. at tosa um, hvussu leikluturin hjá fjølmiðlunum er broyttur gjøgnum tíðirnar, og um leiklutin hjá miðlunum í nútíðar fólkaræðinum. Hvør setur dagsskránna, hvørji val gera ein fjølmiðil og hví? Við atliti til fullveldismálið og fólkaatkvøðurnar verður spurt, um retorikkur í miðlunum kann flyta atkvøður — og um so er: hvussu? Og hvussu skulu politikkararnir bera seg at. Er tað t. d. ein fyrimunur at hava sjónvarpstekki? Og fekk landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum nakran ivandi í sín part við hjálp av umboðskassa sínum?

Sí eisini heimasíðuna www.sleipnir.fo/setur/tiltoek

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

Viðmerking:

# Hvar er virðingin fyri føroyska demokratinum?

Oddagreinin í einum blaði er tað staðið, har leiðsla blaðsins ger vart við sína áskoðan um aktuel evni. Hetta var tað fyrsta, ið eg hugsaði, tá eg las oddagreinina í Sosialinum týsdagin t. 8. februar, ið snúði seg um ta sonevndu "breiðu semjuna" um ríkisrættarligu støðu Føroya. Og tá greinin var lisin, kom eg at hugsa um eina aðra yvirskrivt, ið herfyri stóð yvir eini viðmerking hjá formanni Javnaðarfloksins, ið endurgivin eftir minninum ljóðaði nakað soleiðis: "Nú mugu tit taka tykkum saman á Sosialinum".

Ikki veit eg, um formaður Javnaðarfloksins fyri tíðina er nøgdur við Sosialin, men ikki haldi eg meg fara heilt skeiva, tá eg pástandi, at oddagreinarnar í Sosialinum endurgeva sjónarmiðini hjá Javnaðarflokkinum. Loyvi mær tí eisini at halda, at nevnda oddagrein inniheldur sjónarmiðini hjá Javnaðarflokkinum í sambandi við sonevndu "breiðu semjuna", ið so nógv hevur verið tosað um.

**Skilji onki**

Men tá ið eg hevði lisið oddagreinina nakrar ferðir, var eg ikki sørt sjelkað. Tí hon staðfestir, at tann breiða semjan: "…nú er uttan um Tjóðveldisflokkin".

Uttan at nevna aðrar flokkar við navni gevur skrivingin seinastu vikuna einum varhugan av, at sipað verður til, at Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin umboða hesa "breiðu semju".

Nú kann tað vera, at eg fari skeiv, men eg helt annars, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin vóru í andstøðu!?! Um so er, er okkurt spinnandi galið, tí hvussu kann ein breið semja um fullveldismálið gerast ímillum ein samgonguflokk og tveir andstøðuflokkar, uttanum tann størsta samgonguflokkin, meðan samgongan framvegis situr sum um onki varð hent???

Kanska okkurt av teim gløggu høvdunum á Sosialinum kann forklára mær, hvussu hetta kann bera til?

**Demokratiski hugburðurin**

Meðan vit bíða eftir eini nærri útgreining frá ábyrgdarhavaranum av oddagreinini um, hvat hann meinar við, tá hann skrivar hetta, kann eg ikki lata vera við at lata nøkur orð fella um demokratiska hugsunarháttin aftan fyri sjónarmiðini í henni.

Síðan samgongan varð skipað og fullveldisætlanin stungin út í kortið, hevur Javnaðarflokkurin ferð eftir ferð prædikað um demokrati og um sannan demokratiskan framferðarhátt í fullveldismálinum. Ja, av og á hevur tað næstan verið líkt til, at javnaðarfólk hava hildið, at Javnaðarflokkurin er einasta trygd fyri føroyska demokratinum.

Eg havi tó ógvuliga ringt við at fáa henda "demokratiska hugburðin" hjá Javnaðarflokkinum at passa saman við oddagreinina í sosialinum, har *andstøðuflokkurin* Javnaðarflokkurin staðfestir, at tann "breiða semjan" skal gerast uttanum størsta samgonguflokkin.

Tí Javnaðarflokkurin er ikki í eini støðu, har flokkurin kann diktera føroyskan politikk! Flokkurin umboðar 21.9% av veljarafjøldini, og er harumframt í andstøðu. Men kanska er truppult at sleppa gamla hugburðinum, ið helst stavar frá tíðini, tá Javnaðarflokkurin helt seg hava einkarætt uppá løgmanssessin.

Vil Javnaðarflokkurin gera breiðar semjur uttan um størsta samgonguflokkin, hevur parlamentariska demokratiið greiðar reglur fyri, hvussu farast skal fram. Javnaðarflokkurin kann seta misálitisváttan mótvegis landsstýrinum. Er meiriluti fyri hesum, kann flokkurin síðan arbeiða fyri eini nýggjari samgongu. Hetta eru tær demokratisku spælireglurnar, og tær eru eisini galdandi fyri Javnaðarflokkin!



**Samstarvið við danskar kreftir**

Oddagreinin í Sosialinum týsdagin t. 8. februar er bert enn eitt dømi um eina viðmerking, sum av álvara hevur fingið meg at ivast í, um leiðsla Javnaðarfloksins í heila tikið hevur nakra sum helst virðing fyri føroyska demokratinum. Tann kendasta er fortalilsið hjá Poul Nyrup Rasmussen frá kongressini hjá donsku sosialdemokratunum miðskeiðis í september 1999. Har segði hann m. a., at hann og Eidesgaard "_fra hver vores position gør, hvad vi kan for at hjælpe hinanden…".

Tíverri fyri báðar partar, var øll kongressin fest á band og løgd út á internetið, og harvið fekk føroyski almenningurin innlit í, hvat ið fór fram. Síðani tá, hevur formaður Javnaðarfloksins gjørt alt, ið hann er mentur, til at sláa alt hetta upp í glens og gera gjøldur burturúr atfinningunum mótvegis hesum samstarvi.

Men hann kann ikki renna frá tí veruleikanum! Føroya Landsstýri, ið er tann lógligt valda stjórnin í Føroyum, fyrireikar teir mest umrøðandi samráðingarnar í yvir 50 ár, meðan andstøðan við Javnaðarflokkinum á odda førir ein somikið harðan andstøðupolitikk, sum ikki er sæddur í Føroyum í nýggjari tíð. *Samstundis* vilja formaðurin í Javnaðarflokkinum (sum hóast oddagreinirnar í Sosialinum framvegis er í andstøðu) og formaðurin í størsta danska stjórnarflokkinum (sum eisini er forsætisráðharri), gera alt tað teir eru mentir fyri at hjálpa hvørjum øðrum! Ikki sær hetta vakurt út_!

Tí vil eg loyva mær at spyrja: Hvar er virðingin fyri føroyska demokratinum???

Og hvørjum áhugamálum arbeiðir leiðsla Javnaðarfloksins fyri, tá samstarvið við danskar kreftir er so eyðsæð, sum Poul Nyrup Rasmussen sigur tað vera???

**Ein áheitan**

Líkt er til, at oddagreinin í Sosialinum týsdagin er enn ein liður í hesum politikki. Hetta kann vera ein avleiðing av, at Sosialurin hevur "tikið seg saman", í samsvar við áðurnevndu áheitanina hjá Jóannes Eidesgaard, men føroyska demokratinum tænir hetta neyvan.

Mær er ikki møguligt, hvørki sum løgtingslimur ella sum privatpersónur, at siga Sosialinum, hvussu blaðið skal skriva. Hvaðna minni kann eg siga leiðslu Javnaðarfloksins, hvønn politikk flokkurin skal føra í fullveldismálinum.

Men eg vil heita á Sosialin um at vísa virðing fyri tí føroyska parlamentariska demokratinum!

Eg vil inniliga heita á bæði Sosialin og leiðslu Javnaðarfloksins um, at virða landsins lógligt valdu myndugleikar!

Og eg vil eins inniliga heita á leiðslu Javnaðarfloksins um at seta føroysk áhugamál fram um øll útlendsk, tá farið verður undir samráðingarnar í næstum!

**Annita á Fríðriksmørk**
**løgtingskvinna**

# Stórsti kunnleikamiðdepilin í Norðurlondum um heilaskaða

NeoZone WebCenter er hin stórsti kunnleikamiðdepilin um heilaskaða sum er á vevinum, og síðani 10. januar í ár hava fleiri enn 900 fólk vitjað inn á heimasíðuna. Her fært tú allan tann kunnleika um heilaskaða, tær tørvar ella leiðbeining (tengingar) til aðrar heimasíður við júst tí, tú leitar eftir. Samlaða talið av síðum er fleiri hundrað, so tað gerst ikki eftir einum degi, fert tú framvið.

Á heimasíðuni kanst tú eisini síggja videofilm um heilaskurviðgerð, interaktivar myndir av heilanum, hoyra bandaða talu um, hvussu heilin mennist og mangt annað forvitnisligt.

NeoZone WebCenter arbeiðir saman við navnframum fólki sum Susanne Freltofte, neurosálarfrøðingi, Birgitte Christensen ergoterapeuti, Hjerneskadeforeningen, Center for Hjerneskade á Universitetinum á Amager, Kognitiv Rehabiliteringsenhet á Sunnaas Sykehus í Noregi, Netdoktor, Medscape hjá Reuter o. fl. ø. Men tað eru ikki danir ella sviar, sum reka heimasíðuna, men føroyingurin Jón Ellendersen, sum er búsitandi í Herlev í Danmørk.

Jón er socialpedagokur og arbeiðir dagliga við afturvenjing af fólki við ymsum heilaskaðum, hetta á Lions Kollegiet í Keypmannahavn. Hann hevur eisini skrivað seruppgávu um afturvenjing av heilaskaddum.

Við í hópinum sum fáa tilfar til vega og annars veita aðrar tænastur eru ergoterapeutar, neurosálarfrøðingar, fysioterapeutar, læknar og onnur, bæði í Norðurlondum, í USA og Bretlandi.

Heimasíðan hjá NeoZone WebCenter lat upp í juni 1999, men hevur skjótt vaksið seg stóra, og hvønn dag økist talið av vitjandi. "Vit fáa vitjan av avvarandi, blaðfólki, fólki við heilaskaða, rithøvundum, fakfólki av ymsum slag, og viðhvørt stendur á at svara øllum spurningum og áheitanum, vit fáa. Áhugað kunnu fara sær ein túr inn á http://neozone.dk.



Viðmerking:

# Svf - ein tjóðarskomm

Leiðslan og starvsfólkið eru syndabukkar - mett oyðsluvætti og ódugnakroppar, men veruligu syndararnir, løgting og landsstýri, tváa hendur, um tey tíma so frætt. Ryggin sýnast tey í øllum førum at hava frían.

Sjónvarp Føroya, sum átti at verið bjartasti vitin hjá føroysku tjóðini, líður undir einari eyðmýking fyri og aðrari eftir.

Vitleysa og eirindaleysa privatiseringstrongdin, sum gongur sum hervilig landfarsótt um landið, er nú eisini við at jarðleggja SVF.

Millum manna og nógvar politikkarar hoyrir tú bara um, hvussu nógv fólk starvast á stovninum og hvussu lítið viðkomandi SVF er. Óvitska og lítil vilji at kanna veruligu viðurskiftini eru í flestum førum grundarlagið undir orðaskiftinum.



**Vit drýpa høvur í sorg**

Øll tey, sum vita um tað slóðbrótandi og sera dugnaliga arbeiði, sum er gjørt í Sjónvarpi Føroya, síðan tað varð stovnað í 1984, drýpa høvur í sorg um ta viðferð undangongufólkini í føroyskari mentan hava fingið. Hugburðurin er bygdur á so ússaliga grund, at orð finnast ikki fyri tí.

**Manningin lítil**

Fyri at koma til manningina fyrst, so kann upplýsast, at fyri fáum árum síðan vóru 4000 fólk í starvi hjá svenska útvarpi/sjónvarpinum. Í DR starvaðust um somu tíð millum 2 og 3000 fólk. Nógv flest virkaðu við sjónvarp.

Hjá okkum eru millum 60 og 80 medarbeiðarar í ÙF og SvF tilsamans. Vit senda ikki nógv minni enn DR og Svt. Men okkara almennu fjølmiðlar hava fólk, sum við sera smáum miðlum royna at menna SVF og ÙF, fólk sum settu sær stór og týðandi mál við t.d. Øravíkarskjalinum. Einasta forðing fyri, at ætlanirnar kunnu setast í verk, er hugburðurin hjá ikki minst politiska valdinum.

**SvF ein søkkandi skúta**

SvF, sum átti at verið stoltasta farið í føroyska mentanarheiminum, er í staðin søkkandi skúta í ússaligu privatiserings småligheitini.

Í staðin fyri at heiðra og eggja fjølmiðlafólk okkara til at menna almennu fjølmiðlarnar, so tóku teir fíggjarliga grundarlagið undan teimum.

**Spæla seg burtur úr neyðini**

Skal eg koma við einum hjartasuffi um kanska serstakliga leiðsluna í SVF og partar av gomlu sjónvarpsnevndini, so var tað tann góðviljaða og góðtrúna ætlanin um at, SVF - Mentanarflaggskipið - skuldi spæla sær fígging til. Hetta var mannminkandi og látulig avgerð, ja, stór skomm fyri tað føroyska fólkið.

Mottoið gjørdist: **Vilt tú hava gott alment sjónvarp, so spæl Gekk.** Stór etandi skomm.

SvF varð tikið av løgtingsins fíggjarlóg, nú skuldi public servise stovnurin hjá føroyska fólkinum rekast á handilsligum støði.

**Politikkararnir spæla fríspæl - leiðsla og manning syndabukkar**

Meiningin hjá leiðsluni var óivað góð, men alt ov naiv. Ov tíðliga varð givið upp fyri skutul. Sjálvsagt høvdu onnur samábyrgd við leiðslu og starvfólki í SvF, og hesi skuldu komið fram í ljósið og drigin til ábyrgd.

Úrslitið er, at leiðslan og starvsfólkið nú eru syndabukkar - mett oyðsluvætti og ódugnakroppar, men veruligu syndararnir, løgting og landsstýri, tváa hendur, um tey tíma so frætt. Ryggin sýnast tey í øllum førum at hava frían.

**Albanskir tilstandir - eydnuspæl (pyramiduspøl?) skal bjarga landinum**

Jú, mangt er forborgið. Vit eiga at vænta, at í næstum fara fróðskaparsetrið, studentaskúlarnir, skjalasavnið, bókasavnið o.s.fr. undir tiltøk at savna pening til sítt virksemi við eydnuspølum av ymsum slag. Kanska nørir tað um hugflogið hjá mongum landsmanni, men heiðurligt er tað neyvan fyri eitt framkomið fólk at bera seg so at.

Vit eru væl á veg á heilsuøkinum. Dagliga fáa vit tey tíðindi, at skipað verður fyri vælgerðartiltøkum um landið til tess at bjarga sjúkrahúsunum neyðug tól.

Nei, álvararos, nær halda vit føroyingar, at skommin er fullkomin? Ella finst eingin skomm í okkum longur?

**Ríkisfelagsskapurin sparir SvF fyri stórar útreiðslur**

Samstundis, sum vit taka grundarlagið undan SvF, tosa vit um at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum - og einki øvugt orð frá mær um tað, tí vit skulu framvegis liva í frælsum landi, har frælsir borgarar taka støðu til ríkisrættarligu støðu okkara - , men júst støða okkara í danska ríkinum ger, at SvF fær alt útlendskt tilfar, filmir o. a. fyri smápening í sjónvarpshøpi. Gav ríkisfelagsskapurin okkum ikki henda framíhjárætt, so kostaði sjónvarpið uppaftur nógv meira.

Missa vit møguleikan, vit hava gjøgnum ríkisfelagsskapin, verður støðan uppaftur munandi verri, tí í verandi støðu fer meginparturin av fíggjarætlan sjónvarpsins til tær føroysku sendingarnar.

**Veruligt tjóðarsjónvarp ella einki**

Vit føroyingar eiga nú at taka støðu til, um vit vilja hava eitt alment føroyskt sjónvarp ella ikki.Taka vit ta støðu, at tað er fjantavesin at brúka pening uppá henda stovn, skulu vit bara taka ta støðuna og so lata útlendingar og kapitalkreftirnar einsamallar stýra føroysku mannasálini. Vilja vit ikki tað, so skulu vit veruliga fara at taka spurningin upp á eitt stig, sum sømir seg einum fríum og frælsum fólki. Einum fólki, sum vil lata nakað og so bera høvdið hátt. Tað gera londini rundan um okkum, og tað eiga vit sjálvsagt eisini at gera. Tað er lutfalsliga nógv kostnaðarmeiri hjá okkum at gera gott sjónvarp enn tað er hjá grannunum, men vit eiga at hugsa stórt uttan at vera hástór. Tað er í hvussu so er mín støða.

**Fjølmiðlar fyri 25 milliónir**

Uttan at hava sett meg inn í tey avgjørt røttu tølini, so meti eg, at SvF og ÚF sum føroyskir public service stovnar eiga at fáa umleið 25 milliónir krónur á fíggjarlógini um árið. Tær 15 eiga at fara til SvF og hinar 10 til Útvarp Føroya. Møguliga er Útvarpið so væl fyri, at teimum ikki tørvar so nógv. Men tað er einki at ivast í, at 15 milliónir árliga er ikki eitt oyra ov mikið til SvF, um tað skal mennast so mikið, at vit kunnu vera kent við tað.

**Hans Jørgensen**

# Snávaði Útjaðarin?

Nú er drúgv tíð gingin síðani nakað hoyrdist um tað positiva arbeiði, sum útjaðarapolitikarar tóku stig til. Hvat er orsøkin? Hevur ein hug at spyrja.

Tað má ikki henda, at slíkt arbeiði dettur niðurfyri. Tað er øllum púra greitt, at uttan eitt gottt og miðvíst arbeiði millum politikarar úr útjaðaraøkinum, fer einki at henda til bata á hesum økjum.

Sjálvandi skal farast fram við skili og undir ábyrgd. Tað er burturvið, at onkur roynir at fáa sær politiskan løtuvinning burturúr við at royna at seta aðrar í beinleiðis knípu. Havast má í huga, at nakrir eru í samgongu meðan aðrir eru í andstøðu. Hetta setir sjálvandi serlig krøv til politiskan dugnaskap og skynsemi og eigur ikki at vera einstíðandi við, at ikki kann arbeiðast saman. Tí royndir vísa hóast alt, at einans samanhald og gott politiskt stev og planlegging tvørtur um politisk mørk kann nú bjarga útjaðaraøkjunum frá avtofting.

Eg havi hug at finnast at, at byrjanarroyndir tykkara í sjúkrahúsmálinum eins væl og í málinum um oljuútgerðarhavn fór fram eftir frummum. Hatta er als ikki mátin at gera tað uppá. Slíkur framferðarháttur kann lættliga forkoma øllum samstarvi um útjaðaran. Har átti stevið millum suðuroyarpolitikararnar at verið betur og spell var, at tað góða samstarvið longu tá snávaði og mundi farið fyri bakka.

Eg fari at heita á tykkum allar um sum skjótast at finna saman aftur. Tað má ikki eydnast eitt nú nøkrum einoygdum blaðmonnum úr høvuðastaðnum ella nøkrum lokalpolitikarum í miðstaðarøkinum at seta kílar tykkara millum, ikki heldur at ræða tykkum við hóttanum ella látursgerðing, slíkt er ov bíligt. Verið eisini á varðhaldi móti floksdiktaturi.

Haldið fast í góða viljan og finnið stevið aftur, tað er einasti møguleiki fyri bjarging. Latið ikki tíðina ganga undan. Nú hastar við bøtandi hond til útjaðaran.

**Vinarligast**
**Johannes Jacobsen, Klaksvík**

# Vivð. uppsagnunum í Sjónvarpi Føroya



Seinastu dagarnar er áhaldandi ført fram, at leiðslan í Sjónvarpi Føroya ikki fylgdi reglunum, tá hon starvsfólki frá, at hon ætlaði at siga teimum úr starvi. Ein teirra, sum hevur fært hetta fram, er formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Til hetta er at siga, at viðkomandi starvsfólk fingu fráboðanina júst soleiðis, sum formaður Starvsmannafelagsins mælti til. Sama morgun, sum eg skuldi boða starvsfólkunum frá, ringdi eg til Gunnleiv Dalsgarð, sum síðani vegleiddi meg um, hvussu eg skuldi boða frá. Vit vóru samdir um, at sáttmálin skal skiljast soleiðis, at starvsfólkini fáa at vita, at ætlanin er at siga teimum upp, men at bæði tey og felagið hava 14 dagar til at viðgera ætlanina.

Eg havi gjørt júst soleiðis, sum formaður Starvsmannafelagsins mælti mær til. Felagið fær nú tilfarið til ummælis og hevur so 14 dagar til at meta um ætlaður uppsagnirnar.

Almenni uppsagnarpolitikkurin mælir til, at starvsfólk eiga at fáa høvi at fara úr starvinum beinanvegin. Hetta tulkaði leiðslan í SvF sum, at tey áttu at sleppa av arbeiðsplássinum við løn í somu løtu, sum tey høvdu fingið fráboðanina - hetta fyri at lætta um hjá teimum. Fyrstu dagarnir kunnu hjá summum kennast sum teir sárastu, eisini sjálvt um tey hava eina 14 daga hoyringstíð.

Starvsmannafelagið metir hinvegin, at tey ikki eiga at sleppa av stovninum, fyrr enn uppsagnirnar eru endaliga avgreiddar eftir 14 dag hoyringstíðina. Hetta er ein spurningur um tulkingar. Er tulkingin hjá Starvsmannafelagnum røtt, er hettta tað einasta, sum ivi kann vera um í sambandi við ætlaðu uppsagnirnar.

Eisini hevur verðið ført fram, at leiðslan í SvF skal hava brotið grein 2 í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Til tað er at siga, at leiðslan hevur onga broyting framt á stovninum, sum krevur støðutakan eftir hesi grein. Fer leiðslan at gera tað, fer hon eisini at fylgja greinini.

**Vinarliga**
**Tróndur Djurhuus, stjóri**

# Sjúkrahús og fólkagrundarlag

Fólkagrundarlagið hevur seinastu tíðina av og á verið lagt sum grund, tá metast skal um bítið av jattanini til tey trý sjúkrahúsini í Føroyum.

Her er óivað komin ein misskiljing í. Játtan til sjúkrahús er í fyrsta lagið grundað á tær uppgávur, skyldur og aktivitet sum sjúkrahúsið hevur.

Ríkissjúkrahúsið hevði minst 90% av síni játtan um fólkagrundarlagið varð brúkt sum mátistokkur.

Tað finnast fleiri sjúkrahús í heiminum og eisini í Danmark, sum als ikki hava nakað fólkagrundarlag, men bert taks sær av seruppgávum. Hesi høvdu ikki fingið nakra játtan í heila tikið um játtað varð eftir fólkagrundarlagnum.



**Vinarliga Jákup Petersen, yvirlækni**